# Hósdagur 2. mai

svf

18.25 DV í kvøld
18.30 Pocahontas 12:26
19.00 Vit eru føroyingar - Tórshavnar Manskór e
20.00 Dagur og Vika
20.20 Magn
20.45 Úr Kap til Kilimanjaro
21.15 Ally McBeal
22.00 Krimitímin: shúsið 1:3
22.55 Kríggj aldarinnar 2:4 - dokumentar frá BBC
23.45 Liðugt

EUROSPORT

7.30 Golf - U.S. P.G.A. Tour Greater Greensboro United States
8.30 Sailing - Volvo Ocean Race
9.00 Football - European Under-17 Championship
10.00 Football - European Under-17 Championship - Live
11.45 Football - World Cup Stories
12.00 Football - World Cup Legends
13.00 Equestrianism - World Cup - Live
15.15 Cycling - Tour of Romandy Switzerland - Live
16.15 Football - European Under-17 Championship
17.45 Football - World Cup Stories
18.15 Football - Kick In Action Special South America
18.45 Football - World Cup Stories
19.00 Football - Gillette Dream Team
19.30 Boxing - Heavyweight Explosion
21.45 Football - World Cup Stories
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Football - European Under-17 Championship
23.45 Rally - Rally Raid World Cup Tunisia
0.15 News - Eurosportnews Report

BBC PRIME

0.00 TLZ: »Journeys to the Bottom of the Sea – The Mystery of the M1«
1.00 TLZ: »The Diamond Makers - Horizon«
2.00 TLZ: »Volcanoes And The Atmosphere«
2.25 TLZ: »Mind Bites«
2.30 TLZ: »Sounds – What Have the `60s ever done for us?«
2.40 TLZ: »Science Bites – Knots And Bugs«
2.45 TLZ: »Forens – Lab Detectives«
3.00 TLZ: »Catching The Good Health Train«
3.30 TLZ: »Biosphere«
4.00 TLZ: »Trouble at the Top«
4.40 TLZ: »Science in Action«
5.00 TLZ: »The French Experience – Langues Et Pays«
5.15 TLZ: »The French Experience – Identites«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 The Story Makers
6.15 Step Inside
6.25 Angelmouse
6.30 Joshua Jones: »Sting«
6.40 Playdays: »Dot Stop«
7.00 Trading Places
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders
8.45 Bargain Hunt
9.15 Wild And Dangerous: »Croc Catchers«
9.45 Vets In Practice: »New Kid On The Block«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr Who: Dragonfire
11.30 What Not To Wear
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »The Body In The Library« - Part Two
13.30 Ready Steady Cook
14.15 The Story Makers
14.30 Step Inside
14.40 Angelmouse
14.45 Joshua Jones: »Sting«
14.55 Playdays: »Dot Stop«
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »The Best Time«
16.45 Friends for Dinner: »Ainsley Harriot«
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 Health Farm
19.00 Eastenders
19.30 My Hero: »Nemesis«
20.00 The Ice House
21.00 The Young Ones: »Summer Holiday«
21.35 Nurse
22.25 The Big Trip
22.45 Holiday Snaps: »Caribbean:Corfu: Norfolk«
23.00 Casualty

BBC WORLD

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Simpson's World (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.30 Simpson's World (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 Asia Today
11.45 World Business Report
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News – followed by Weather
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 The Car's The Star (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News – followed by Weather
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report – followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News – followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 The Money Programme
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

3

5.00 Garfield og venner
5.25 Børnehjørnet
7.00 TV-Shop
8.00 Hvide Løgne
8.25 Ricki Lake
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen
11.00 Horton-sagaen
11.50 Melrose Place
12.45 Time of Your Life
13.45 Popular
14.35 Lassie på nye eventyr
15.05 Pæn pige – sej sild
15.35 Ricki Lake
16.30 Simpsons
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Sjov og Spas
18.30 The Ellen Show
19.00 Skadestuen
20.00 Bag Facaden
21.00 Sex & the City
21.40 The Guardian
22.40 Seinfeld
23.10 Simpsons
23.40 Ti tommelfingre
0.10 Walker Texas Ranger
1.05 Ricki Lake
1.55 Træneren
2.25 Træneren
2.55 Ti tommelfingre
3.20 Sunset Beach
4.05 Godnat

ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur
7.15 Barnaløtan - Jonna og Kári leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin - Bjarni Mohr og Dia Midjord leggja til rættis
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e)
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm leggur til rættis
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
18.00 Barnaløtan (e) - Jonna og Kári leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Rovfuglurin - Stuttsøga eftir Hanus Kamban. Kári Øster lesur
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
23.00 Tíðindi

## Magn




Føroyski tjóðbúnin hevur av álvara vunnið frama hesi seinru árini. Men spurningurin er, um vit øll hugsa um tann sama búnan. Meiningarnar eru nógvar og ymiskar um snið, lit og mynstur. Men hvat er rætt, og hvat er skeivt - og hvat er loyvt? Hetta koma Nicolina Beder og Marjun Sigurðsdóttir at greiða nærri frá.

Lagt til rættis: Barbara Samuelsen.

## Krimitímin: Íshúsið 1:3

svf Hóskvøldið kl. 22.00

Langt burtur frá øllum á einum stórgarði býr Phoebe Maybury saman við vinkonunum Diana og Anne. Síðan maður Phoebe hvarv fyri 10 árum síðan, hava grannarnir hildið hana uttan fyri og beinleiðis hata hana. Nú er eitt illa farið lík funnið í garðinum hjá henni, og løgreglan leggur doyðin á at prógva, at líkið er av manninum hjá Phoebe og at hon hevur myrt hann.

Leikarar: Penny Downie, Francis Barber og Kitty Aldridge.

Leikrit: Lizzie Mickery eftir skaldsøgu hjá Minette Walters.

Leikstjórn: Tim Fywell.

## Sex and the City

3 Hóskvøldið kl. 21.00

Carrie heldur fyrilestur um, hvussu ein hittir menn fyri einum bólki av kvinnum. Tíverri seta kvinnurnar nakrar beinleiðis spurningar, og hetta fær Carrie at øsa seg. Samantha gerst vinkona við Claire Anne, men tað vísir seg, at hon er meira enn javnverd. Charlotte roynir at vera meira eiggilig yvirfyri Trey.

ÚF

## Morgunlestrar

**29. apríl–4. mai**

***Martin Restorff Jacobsen, prestur, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 29. apríl:**
nr. 301 Í himnabú, í himnabú
Jes. 66,13

**Týsdagin 30. apríl:**
nr. 24 Fedranna trúgv, o, sterka vár
Jer. 17,7 & 8
nr. 335 O, Guð, hav okkum við títt orð

**Mikudagin 1. mai:**
nr. 247 Man í huganum enn finnast
Jóhs. 15,5

**Hósdagin 2. mai:**
nr. 201 Grøvin sterka rivnað er
1. Kor. 15,54 & 55
nr. 195 Deyði, hvar er nú broddur tín

**Fríggjadagin 3. mai:**
nr. 299 Eg veit í himmiríki borg
Jóhs. 16,22

**Leygardagin 4. mai:**
nr. 337 Guð havi lov, tí Harrans orð
Sálm. 84,2 & 3
nr. 330 Yndislig, føgur

Rás

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Fótbóltsprát úr studio 7 í Klaksvík - John William Joensen leggur til rættis
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jeremias profetur (4.12) - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Sjómansendingin á ranguni »Við fuglfiringum á Zarepta« við M. C. Resteroff (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti
2.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast



**VALGREINAR**

# Stevnumið

**Bjarni Djurholm**
*Landsstýrismaður Fólkafloksins*



Nøkur av hjartamálunum hjá undirritaða:

- KT-vinnan skal vera ein hornasteinur í búskapinum.
- Bio- og gengransking skal mennast til framtíðar vinn--ur í Føroyum.
- Starvsstovuvirksemið eigur at savnast á einum staði í Tórshavn og skal tengjast at kunningartøkni.
- Ferðavinnan, kreativar vinnur (t.d. tónleikur og ítróttur) og kvin-nur, sum íbirtarar, skulu mennast.
- Ájavnt við barnaansingina hjá Føroya Tele, skulu almennir stovnar hava somu møguleikar.
- Barsilsfarloyvið skal leingjast til 52 vikur.
- Skattastigin skal prístalregulerast, so lønarvøkstur ikki verður etin upp av harðari skatting.
- Punktgjøldini skulu endurskoðast, so tey gagna brúkarunum og vinnuni.
- Tørvurin á eldraíbúðum, ellis-og røktarplássum verður nøktaður eftir nýggjum ognar- og fíggjar-hættum.
- Landssjúkrahúsið verður liðugt út- og umbygt.
- Nýggjur Tekniskur Skúli verður bygdur.
- Skúlabyggingin við Marknagilsvegin skal endurskoðast.

www.djurholm.fo

# Longt barnsburðarfarloyvi og systkinnaavsláttur í barnaansing

**Mikkjal Sørensen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



Valskrá Javnaðarfloksins er greið og tekur við øll samfelagsviðurskifti. Og skal hyggjast í bakspegilin, so ivast fáur í, at Javnaðarflokkurin hevur tikið tøk, tá tað ræður um at tryggja familjuni, ja øllum føroyingum, góð og virðilig kor.

Føroyska familjan skal hava møguleika at seta búgv fyri rímuligan penga. Tað mugu skapast karmar, so familjur kunnu fáa bústað fyri sámuligan kostnað.

Hetta hevur Javnaðarflokkurin sett sær sum mál.

Og í valskrá floksins stendur eisini greitt, at barnsburðarfarloyvið skal leingjast upp í 1 ár.

Barnaansing er ein trupulleiki kring landið og ofta ein tungur postur hjá einstøku familjunum. Javnaðarflokkurin virkar eisini fyri, at systkinaavsláttur verður settur í gildi í barnaansingini.

Lesur ein valskrá Javnaðarfloksins, so fæst ein heildarmynd av politikki floksins, har øll hesi mál eisini eru umrødd. Tí politikkur er so mangt, tað er at seta karmar, og í politikki er ein lutur ofta onnur síðan av aðrari søk. Samfelagið er ein heild, har familjan er ein hornasteinur.

Grundarlagið undir so mongum samfelagsviðurskiftum, eru best hugsandi kor til familjurnar, fólkið. Og her er stevnumið Javnaðarfloksins greitt, tað sær hann, ið lesur valskrá floksins, ið setur "Fólkið fyrst".

# Ein stoltleiki fyri Eiðis bygd

**Tordur J. Niclasen**
*valevni Miðfloksins í Eysturoy*



Knút Vesturdal, bygdaráðslimur á Eiði hevur rætt, og hevur hann saman við undanfarna borgarstjóranum Hans J. í Kollsbyrgi tøkk uppiborna fyri tað stríð teir løgdu í hetta arbeiðið.

Somuleiðis hevur bygdaráðið tøkk uppiborna.

18.januar 1997 sendi undirritaði Eiðis bygdaráð bræv, har gjørt var vart við støðuna hjá mongum eldri í bygdini og avvarðandi teirra og varð samstundis heitt á bygdaráðið um at taka neyðug stig til at fara undir bygging av húsi til endamálið.

24. februar sama ár fekk eg svar frá borgarstjóranum, har sagt varð frá, at bygdaráðið hevði samtykt, at Hans J. í Kollsbyrgi, Knútur Vesturdal og Tordur J. Niclasen, skuldu arbeiða víðari við málinum.

Nevndin skipaði seg við undirritaða sum formanni.

Farið varð síðan til verka og gekk arbeiðið í nevndini avbera væl, ikki minst teimum báðum nevndarlimunum fyri at takka. Ronald Poulsen, byggiverkfr. var góður í ráðum og gjørdi eitt gott arbeiði.

Eftir at nevndin hevði verið í landsstýrinum og tingast varð tilsøgn frá landsstýrinum uppá kr. 500.000 givin.

Longu í september 1999 stóð húsið klárt.

Hetta heim hevur verið karmur um dagligdegin hjá mongum og hava tey trivist væl , ikki minst orsakað ta orku fyrikomandi og dugnaligt starvsfólk leggur í dagligt arbeiði.

**Inrættan av kjallaranum**

Knút Vesturdal upplýsir, at teir fyri meiri enn tveimum árum síðan skrivaðu og fundaðust við landsmyndugleikarnar. Enn er einki svar komið. Hette er bert ein staðfesting av, hvussu lágt sitandi samgonga hevur prioriterað eldraøkið. Hesir somu sum nú geva gylt lyfti, um at "rættur teirra gomlu skal lógarfestast".

Hóast kommunan er niðurbundin av íløgukarminum hjá landsstýrinum, so hevur sitandi bygdaráð sent umsókn um stuðul til at innrættað kjallaran, soleiðis, at 5 rúm kunnu fáast til vega afturat.

Havi tosað við Sámal P. Í Grund og havi góðar vónir um, at hann gongur umsóknini á møti.

**Tey bygdu hetta land.**

Tað er okkara skulda og ábyrgd at veita okkara gomlu best møgulig kor. Tey hava tað uppiborðið Tað eru tey, sum í Gudsótta og sparsemi, bygdu hetta land.

Tørvurin á røktarheimspláss er stórur og støðan innan eldraøkið hevði verið uppaftur verri, um sambýlini ikki vóru komin. So tey hevði verið ynskiligt, at aðrar kommunur fylgdu fyridøminum av Eiði og fóru til verka. Tí sjálvandi eiga sambýli at verða bygd, soleiðis, at tey ið tørva pláss á slíkum heimum kunnu verða í heimbygdini longs gjørligt.

Hóast sambýli verða bygd, vil tó tørvurin á røktarheimsplássum framvegis gera seg galdandi.

Knútur, takk fyri greinina.

# Hugsjónarleysir politikarar bera ikki tjóðina fram

**Heini O. Heinesen**
*løgtingsm. framsøgumaður í vinnumálum*



Tað eru hugsjónirnar, ið bera tjóðina fram. Av teimum skapast allur framburður, av teimum sprettir lív. Uttan at taka munnin ov fullan, kunnu vit við æruni siga, at tað hava ongantí verið so nógvir hugsjónarloysingar ið bjóða seg fram til at stýra okkara landi, sum til hetta valið.

Av røttum átti tað at verið so, at allir føroyskir politikara og flokkar teirra stóðu saman um frælsishugsjónina, men so er ikki. Tí mugu vit spyrja: Hvussi kann hetta bera til? Hví hava vit allar hesar hugsjónarloysingarnar í føroyskum polittikki? Hví hava teir undirtøku í føroyska fólkinum?

**Deyðadómspretikantar -samríkisflokana:**
Vit hava tíverri sterkar kreftir sum bevíst royna at taka mótið frá føroyska fólkinum við sínum deyðdómsprætikum. Upp móti hesum armóðs politikki, setur Tjóðveldisflokkurin stevnu sína.

Hvat var tað sum gjørdi at okkara samfelag reisti seg aftur, sum fuglurin Fønix aftana kreppuna?

Tað var, og er, hugsjónin um eina sjálvberandi føroyska fiski og -alivinnu uttan studning og veðhald, Við góðum stovnsrøktarpolitikki, sum ger, at vit í dag kunnu tosa um ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Tað er hugsjónin um ein góðan og tryggan sosialpolitikk, skúla og mentanar politikk, samferðslu og -íløgupolitikk, o.v. sum byggir á føroyskan búskap, men ikki á vælvild úr øðrum landi.

Sambandsflokkurin er nú farin at seta myndir av av gomlum vælbjargaðum sambandspolitikarum í bløðini, sum tekin uppá trygdina í Ríkisfelagskapinum.

Javnaðarflokkurin er hinvegin farin at gerða innrás á arbeiðsplássini hjá okkara lægstløntu arbeiðarum, og á ellis- og røktaheiminum runt landi. Um hetta eisini er eitt tekin uppá trygdina í ríkisfelags skapinum, veit eg ikki.

Eg vóni bara ikki, at teir gloyma at siga, fyri øllum hesum veljarnunum, at teir batar sum eru komnir, og vónandi fara at koma, byggja á tann betraða føroyska búskapin. Um teir siga nakað annað, so siga teir ósatt.

Sum orðatakið sigur: "Tað er vána fuglur sum drýtir í egið reiður"

Hvar var trygdin í ríkisfelagsskapinum tá ástóð? Hon var ikki til. Heldur var tað so, at danir løgdu stein omaná byrðu, við at brúka føroyska landskassan til at bjarga bankunum. Sambandsmenn hava sjálvir sagt at hetta er eitt felagsmál.

Hvat er so boðskapurin frá hesum flokkum? Jú teir vilja í sínum hugsjónarloysi, fyri ein hvønn prís innlima føroysku tjóðina í tað donsku. Tað vil siga, teir eru til reiðar at frásiga sær frumburðarættin til okkara føðiland. Um teir faa makt sum hava teir agt. Teir eru røktingamenn hjá donsku stadsmaktini, uttan at verða bidnir.

Vilt tú forða hesum ørskapinum, fert tú á val og velur Tjóðveldisflokkin 30. apríl

Heimasíða mín:
http://heima.olivant.fo/~hoyh/